VIÐMERKINGAR

Jústinus Eidesgaard svarar Høgna Hoydal:

# Tá ið manipulatiónin gerst ein kunstur

**- Hevði ein ministari verið avdúkaður fyri at hava logið beinleiðis fyri almenninginum í útlandinum, so hevði hann fingið sekkin. Fyri Høgna Hoydal fekk tað ongar avleiðingar at hava logið upp á floksfelaga sín Tórbjørn Jacobsen, skrivar Jústinus Eidesgaard, sum finst hvassliga at Høgna Hoydal fyri hansara viðferð av fjølmiðlum. Hann greiðir m. a. frá eini hending, tá Høgni Hoydal vildi steðga eini útgávu av Sosialinum**




*- Eitt tað grellasta dømi um, hvussu sannleikin kann verða snúgvaður av trøllvaksnum monnum upplivdi eg sum tíðindaleiðari á Sosialinum fyrst í hesi øldini, tá Tórbjørn Jacobsen hevði kallað Anfinn Kallsberg, løgmann, ein danskan leigusvein. Við at lúgva fyri Føroya fólki bjargaði Høgni Hoydal landsstýrissessinum hjá Tórbjørn Jacobsen. Myndin omanfyri er eitt gott dømi um manipulatiónina, Merkið, morreyða kotið og Tjaldrið sjálvandi, skrivar Jústinus Eidesgaard m. a.*

*Mynd: Jens Kiristian Vang*

KRONIKK



*Eftir Jústinus Leivsson Eidesgaard, rithøvundur*

Formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, hevur nú um dagarnar ein fyrispurning til stjóra og nevnd í Føroya Tele í samband við søluna av Sosialinum. Hetta hevur Høgni allan rættin til og eg eri ikki heilt ósamdur við honum. Størri opinleiki kundu gott verið um hesa sølu, og tað er ikki serliga hóskandi, at sjálvasti okkara løgmaður Jóannes Eidesgaard, skyldmaðurin, systkinnabarnið, stendur á odda fyri hesari sølu, og er avmyndaður á forsíðuni á Sosialinum saman við Jan Müller, blaðstjóra, har boðað verður frá at teir skiljast sum vinir. Heilt erligt, tað minkar eitt sindur um tignina hjá løgmanni at hann er so tætt knýttur at pressuni. Vit vita heldur ikki hvør leikluturin hjá Kristjan Magnussen hevur verið í søluni, hann og stjórin fyri Føroya Tele, Andras Róin eru svágrar. Eg sigi ikki, at nakað skeivt er farið fram, men tað gjørdi einki, sum Javnaðarflokkurin hevði lýst hesi viðurskifti so greidliga, at ongin illgruni var til steðar. Tað er tann sum er ógegnigur, ið hevur skyldu at boða frá hesum sambært okkara fyrisitingarlóg. Javnaðarflokkurin kundi fingið onkran annan partísoldat longri niðri á stiganum at avgreitt hendan handil, heldur enn sjálvasti løgmaður.

Høgni er andstøðupolitikkari í løtuni, burturgloymdur, og tað er hansara skylda at skapa ruðul, so fólk aftur kunnu fáa eyga á hann og hansara flokk, einki øvugt orð um hann brúkar hetta málið. Tað er nú einaferð politikkur.

Tað sum fær meg at tríva í pennin er viðferðin Høgni Hoydal gevur mínum fyrrverandi starvsfeløgum, báðum blaðstjórunum Jan Müller og Eiriki Lindenskov og harvið eisini allari blaðmanningini á Sosialinum seinastu árini. Høgni skrivar:

*"Ongin kann lasta Jan Müller, Eiriki Lindenskov og øðrum, at teir dríva partapolitiska propaganga, sum teir altíð hava gjørt."*

Hetta eru grovar ákærur og samstundis er hetta ein ákæra um at Sosialurin ikki hevur roynt sítt ítarsta frá at vera eitt vanligt floksblað til at gerast eitt óheft tíðindablað. Og tað er júst her eg kenni meg raktan og partvíst eisini særdan.

Eg havi brúkt átta ár av mínum lívi at gera mín part fyri at broyta Sosialin frá einum vanligum flokksblaði til eitt óheft tíðindablað. Vit eru nógv sum hava tikið tøk, og ábyrgdarblaðstjórin Jan Müller hevur gingið á odda. Seinastu mongu árini hevur Eirikur Lindenskov eisini verið blaðstjóri og hansara partur liggur avgjørt ikki eftir. Hann hevur verið ein eldsál til at broyta Sosialin til eitt óheft tíðindablað.

Alt hetta veit Høgni og hann veit eisini, at hann leggur eftir einum liggjandi manni, tá ið hann sparkar út við, at Sosialurin verður rikin partapolitiskt. Hann veit, at blaðstjórarnir fáa illa vart seg á sannførandi hátt og heldur ikki hini á blaðnum.

Jan Müller er eitt ótrúliga lætt offur hjá Høgna Hoydal. Høgni veit og øll vita, at Javnaðarflokkurin útnevndi Jan Müller til blaðstjóra í áttatiárunum. Tað Javnaðarflokkurin ikki visti var, at Jan hevði heilt aðrar visiónir við blaðnum, enn eitt vanligt floksblað. Seinastu tvey ártíggjuni hevur hann ført hesar visiónir út í lívið og í dag er blaðið óheft.

Eirikur Lindenskov er eisini eitt ógvuliga lætt offur hjá Høgna Hoydal. Eirikur er føddur inn í Javnaðarflokkin. Pápi hansara Jákup Lindenskov hevur í mong ár tænt flokkinum bæði sum løgtingslimur, fólkatingslimur og landsstýrismaður. Eirikur var sum ungur virkin í flokkinum og hann fær ikki tagt sítt tilknýti til flokkin burtur. Harvið er ikki sagt, at hann sum blaðstjóri rekur javnaðarpropaganda. Tað ger hann ikki, tað veit eg.

Høgni Hoydal er ikki nakað dummur hundur, tað svingar væl í ovastu hædd og hann veit, at hvørgin av blaðstjórunum fáa vart seg nakað av týdningi, antin fyri at hava verið í tænastu hjá Javnaðarflokkinum ella at hava arvað ideologist tilknýti til flokkin, eitt band, sum kann verða seigt at rista av sær.

Eg havi síðan eg kom á Sosialin fingið litið mangar álitisuppgávur upp í hendi, og tey flestu árini havi eg havt eitt avgerandi orð at siga um hvørjar greinar vit hava valt at selja blaðið við á forsíðuni. Jan Müller hevur havt álit á míni fakligu hvitan sum útbúgvin journalistur. Eg havi sitið á 100 tals redaktiónsfundum á Sosialinum, og eg veit ikki um eitt einasta dømi, har vit hava valt greinar frá ella til, tí hesar hava tænt einum politiskum flokki meira enn gott er. Jan er umframt at vera blaðstjóri, útbúgvin journalistur og hann hevur altíð lagt doyðin at gera arbeiðið greitt eftir teimum fakligu grundreglunum sum mynda journalistikk. Tað er komið fyri, at vit hava tikið upp greinar hjá journalistum og kanska koyrt tær í skrellispannina, um politiska siktið hjá journalistinum er komið fram um journalistiska siktið og tá hevur onkur orrustan verið. Tað er tann einasta fráveljingin eg veit um. Ein journalistur hevur tvær meginreglur at ganga eftir, hann skal vera so objektivur sum gjørligt og so sakligur í merkingini erligur sum gjørligt.

Tað hevur verið beinleiðis ein vansi hjá Javnaðarflokkinum at átt Sosialin undir leiðslu Jan Müllers. Eg veit ikki hvussu nógv dømi eg havi um, at eg havi valt greinar har javnaðarmenn eru aktørar frá og tikið greinar har tjóðveldis ella fólkaflokksmenn eru aktørar, júst fyri at prógva, at vit eru óheftir. Eg havi valt góðar søgur frá og tikið vánaligar fram, fyri at javnvágin skal haldast, og svikið lesaran og journalistik grundprinsippir, fyri at gera paranoid tjóðveldisfólk nøgd og tey eru ikki nøgd allíkavæl. Hetta frával hevur slett ikki altíð verið tikið eftir journalistiskum grundreglum, nógv meira fyri at prógva, at vit eru óheftir, ikki eitt flokksblað, eitt blað, sum hýsir øllum sjónarmiðum. Eg eri rættuliga vísur í, at Dimma hevur havt júst sama trupulleika við Sambandsflokkinum, sum søguliga hevur verið knýttur at blaðnum, tó ikki sum eigari. Tað hevur verið ein vansi fyri Sambandsflokkin, at Dimma hevur valt eina óhefta kós seinastu mongu árini.

Tað óhugaligasta hjá av øllum hjá hesum báðum